


# AÐALSTJÓRI TIL UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

## Vit sóknast eftir einum dugnaligum, ágrýtnum og framskygdum aðalstjóra at standa á odda fyri Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

**Starvið:**
Aðalstjórin er næsti ráðgevi hjá landsstýrismanninum og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Aðalstjórin er ovasti leiðari fyri ráðið.

**Høvuðsuppgávur:**
- Leiða og samskipa arbeiðið í stjórnarráðnum,
- samskipa og fyrireika uppgávur á málsøkjum hjá stjórnarráðnum, nevnd niðanfyri,
- fyrireika lógir, kunngerðir og reglugerðir innan virkisøkið,
- hava eftirlit við stovnum undir stjórnarráðnum, og
- tryggja, at aðrar viðkomandi uppgávur, sum hoyra virkisøkinum til, verða framdar

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjarin hevur:
- kandidatútbúgving frá hægri lærustovni,
- týðandi leiðsluroyndir frá tí almenna og/ella privata arbeiðsmarknaðinum, og
- holla vitan um almenna fyrisiting og fakøkið hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

**Umráðandi er, at tann, ið verður settur:**
- hevur góð leiðslu- og samstarvsevni umframt mennandi leiðslustíl,
- hevur gott strategiskt skil og er slóðbrótari í verkseting av strategiskum arbeiði,
- dugir at seta greið mál og skapa úrslit,
- hevur góðar samskiftisførleikar, bæði munnliga og skrivliga,
- hevur góðar málførleikar, og
- megnar til tíðir at arbeiða undir stórum trýsti.

Tann, ið verður settur, skal hava gott innlit í politisk viðurskifti og vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting.

Týdningarmikið er, at viðkomandi hevur vilja og hegni at ganga nýggjar leiðir.

Nærri greining av stavinum sæst í starvs- og persónsprofilinum (www.tinganes.fo).

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er tænastumannastarv. Starvsheitið er aðalstjóri og er flokkað í 39. lønarflokki. Harumframt er ein mánaðarlig viðbót upp á kr. 5.094,67. Viðbótin er ikki eftirlønargevandi. Tey fyrstu 2 árini eru at rokna sum royndarár.

Setanarøkið fevnir um Uttanríkis- og vinnumálaráðið, stovnar undir tí, Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Uttanríkis- og vinnumálaráðið.

**Umsókn:**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, lívsgongdarlýsing og møgulig viðmæli skulu stílast til løgmann og sendast til:

**Løgmansskrivstovan,**
Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri,
Tinganes,
Postrúm 64,
110 Tórshavn
Ella: info@tinganes.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. mars 2016 kl. 12.00. Starvið verður sett frá 1. mai 2016 ella eftir nærri avtalu. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjuna Hanusardóttir, løgmansstjóra, tel.: 30 60 00 ella 55 10 30.

**Uttanríkis- og vinnumálaráðið er eitt av stjórnarráðunum í landsfyrisitingini. Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum hevur um hendur uttanríkis- og vinnumál. Hann veitur øðrum landsstýrismonnum stuðul í altjóðarættarligum málum og protokollmálum. Hann umsitur m.a. alimál, ferðavinnu, handilsmál, integrasjónsmál, jarðfrøði, kolvetni, norðurlandamál, oljumál, sjóvinnumál, tónleikainnu, tryggingarmál, veterinermál, vinnufeløg og vinnumál.** www.uvmr.fo

**VIT DRAGA EINA LÍNU – VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI – VIT VILJA VITA – VIT BRÓTA SLÓÐ**